## Konsert og handan av virðislønum í Miðlahúsinum



Hósdagin 2. juni kl 19 fáa 12 føroyskir musikkskúlanæmingar handaðar tær virðislønir, sum teir vunnu við Berlingske Tidendes Klassiske Musikkonkurrence í Keypmannahavn í apríl ár.

Hetta fer fram saman við eini konsert í Miðlahúsinum, har næmingarnir m.a. spæla tey musikkstykki, sum vissaðu teimum 1., 2. og 3. virðisløn í kappingini.

Tað var eitt sera lærurríkt námskeið, ið næmingarnir høvdu í Keypmannahavn, har teir, umframt sjálvir at luttaka í kappingini, fingu høvi at hoyra fleiri javnaldrandi gávuríkar danskarar. Harafturat fingu tey tíð til at fylgja frálæruni á Det Kgl. Danske Musikkonservatorium og at geva eina konsert í Føroyahúsinum.

Næmingarnir eru úr Havn, Gøtu, Runavík, Vestmanna, Oyndarfirði, Vágunum, av Sandi og av Toftum.

Tey, ið spæla eru: Saga Kapnas, Margit S. Mikkelsen, Marita Johansen, Jákup H. Lützen, Høgni R. Hansen, Kristina Heinesen, Mattias Kapnas, Katrin H. Petersen, Oluf Dam, Rebekka Hjørleivsdóttir, Jósef Olsen og Kamilla Ravnsfjall.

Birgitte Schnakenburg hevur klaverfylgispælið.

Ókeypis atgongd til konsertina.

## Saybia á MjúS

MjúS festivalurin á Sandi hevur gjørt avtalu við danska bólkin Saybia um at spæla á ársins festivali. Umframt danska bólkin váttar Katrin Petersen samskipari, at 200, Lama Sea, Týr og Lena fara at spæla.

Hon sigur eisini, at atgongumerkini til festivalin verða at fáa á Statoilstøðum og kunningarstovum kring landið, og at okkurt sertilboð verður kunngjørt í vikuni.

Saybia hittaðu stórt í 2002 við lagnum "The second you sleep". Hetta lagið lá á 15 teimum bestu í 38 vikur, og gjørdist næst besta lag í listanum yvir 15 tær bestu í 2002.

Nýggjasta fløgan hjá bólkinum hevur eisini gjørt um seg á donsku útvarpsrásunum og hittlistunum.

**nud**

## Havfrýr selja væl

TÓNLEIKUR

*Niels Uni Dam*
*nielsuni@sosialurin.fo*

Sølan av atgongumerkjum til konsertina við teimum trimum havfrúnum Eivør, Lenu og Guðrun í Keypmannahavn gongur so væl, at fyrireikararnir umhugsa at flyta konsertina í størri sal. Sunnukvøldið vóru einans 77 atgongumerki eftir. Nú verður skrivað upp á bíðilista, fer hesin upp um 250 fólk, verður konsertin flutt.

Salurin, har konsertin verður hildin, tekur 750 fólk, men møguleiki er at fáa størri sal, sum tekur 1800 fólk. Ein annar møguleiki er at skipa fyri eykakonsert í sama sali.

Tað er kvinna.fo, sum skipar fyri tiltakinum, og donsku fjølmiðlarnir geva tí veruliga gætur, bæði Eivør og Guðrun eru vælkend nøvn á danska tónleikapallinum, og kanska serliga Eivør hevur fingið framúr góða umtalu í donskum fjølmiðlum seinastu tíðina.

BT skipar í morgin fyri kapping, har nøkur atgongumerki til konsertina verða burturlutað, og møguleiki er at vinna eina ferð til Føroyar.

Somuleiðis verða tær tríggjar havfrýrnar Guðrun, Lena og Eivør við í Musikmagasinet á P4 hjá Danmarks Radio kl. 14.00 til 15.00 mikudagin.

# Við Johannu TG 326 á søguliga ferð

SLUPPFERÐ

*Tíðindaskriv*

Í ár eru 60 ár liðin síðan Seinni Heimsbardagi endaði. Leikluturin hjá Føroyum, føroyingum og føroyskum fiskiførum kenna vit flest øll. Tær føroysku sluppirnar vóru við til at sigla fisk úr Íslandi og Føroyum (sum sluppirnar antin fiskaðu sjálvar ella reiðaríini keyptu) til Skotlands, og millum hesar sluppir var sluppin Johanna TG 326 úr Vági. Nú 60 ár eru liðin síðan Seinni Heimsbardagi endaði er gjørt av, at Johanna TG 326 ger eina ferð til Norðfjørðin í Íslandi at keypa 1 tons av fiski, og gongur leiðin so av Norðfjørðinum til Aberdeen í Skotlandi, har fiskurin verður seldur. Henda søguliga ferðin verður gjørd til minnis um leiklut føroyinga í Seinna Heimsbardaga, og til minnis um teir føroyingar, sum lótu lív undir Seinna Heimsbardaga.



*Sluppin Johanna TG 326 fer í næstum á forkkunuga ferð, har vitjað verður í bæðI Íslandi og Skotlandi*

Við á ferðini við Johannu TG 326 verða 20 fólk. Millum tey verða ætlandi fólk frá Sjónvarpi Føroya og tveir íslendingar (ein myndamaður og ein ljósmyndamaður). Íslendingarnir koma til Suðuroyar at taka myndir síðst í mai mánað og fara síðani avstað við Johannu TG 326 2. juni og verða við á allari ferðini.

Í sambandi við ferðina verða kunnandi skriv send út til fjølmiðlar í Íslandi og í Skotlandi, hetta í samstarvi við fólk úr Íslandi og Skotlandi (í Skotlandi tekur Sofus Poulsen, fyrrv. Umboðsmaður Føroya í Bretlandi, sær av hesum samskifti. Umboðsstovan var øll hesi 54 árini í 150 Market Street).

Skipari á hesi søguligu ferðini við Johannu TG 326 verður Hans J. Joensen úr Vági, sum er abbasonur Jakke í Líð, sum var ein av skiparunum, sum førdi Johannu TG 326 undir krígnum.

Í Aberdeen tekur ætlandi sami agentur, sum sluppin Johanna TG 326 nýtti undir krígnum, ímóti Johannu TG 326. Hetta felagið er til enn.

Í øllum Stóra Bretlandi verður nógv gjørt burturúr VE (Victory in Europe) og VJ (Victory in Japan) døgunum, ávikavist 8. mai og 15. august, dagarnir tá ið seinni heimsbardagi endaði í Evropa og Japan. Stór hátíðarhald verða skipað í at kalla øllum býum í Stóra Bretlandi og eisini í Aberdeen, har ein "World War II Veterans Parade" verður 11. juni, sum er tann leygardagin Johanna TG 326 kemur til Aberdeen. Í hesum sambandi er nógv á skránni í Aberdeen hetta vikuskifti, og væntandi koma nógv fólk umborð á Johannu TG 326 tann leygardagin og sunnudagin. Umborð verður, eins og í Íslandi, bjóðað ábit og har verður eisini myndaframsýning.

Tey, ið ynskja at fáa meiri at vita um ferðina, kunnu venda sær til Kunningarstovuna í Vági.

# Írskur tónleikur í Miðlahúsinum

Sunnudagin klokkan 21, fáar dagar undan stórdystinum í fótbólti millum Føroyar og Írland, verður írskur tónleikur at hoyra í Miðlahúsinum í Vágsbotni. Tað eru tey bæði, Máire Breatnach og Thomas Loefke, sum fara at spæla. Máire Breatnach spælir violin og Thomas Loefke, harpu.





# Pipar & Salt krydda Listastevnuna

PIPAR OG SALT

*Tíðindaskriv*



Pipar og salt fara á pallin á Listastevnuni, við nýggjum tilfari. Skemtibólkurin hevur seinastu nógvu árini givið føroyingum speiskar og stuttligar lýsingar av føroyska samfelagnum, og teimum sum búleikast her.

Pipar & Salt hava gjørt tilsamans 13 sjónvarpssendingar, og tá teir eru farnir á pall, hevur verið fullsett hvørja ferð.

Tónleikurin hevur altíð havt eitt týdningarmikið pláss í framførslunum, og løg sum "Eg havi tað strævið", "Eg vil heldur spæla rock", "Danmark er et dejligt land", "Don't Mess With Me", "Kikkilakkatjó", "Hvat er lívið ikki herligt" og ikki minst "Ketchup í eitt jørn", eru øll vorðin sannar landaplágur.

Framførslan við Pipar & Salt verður á Listastevnuni leygardagin 13. og sunnudagin 14. august. Tey, sum vilja tryggja sær atgongumerki kunnu venda sær til Norðurlandahúsið og Kunningarstovurnar í Tórshavn og Runavík. Atgongumerkjasølan byrjar hósdagin 9. juni kl. 11.00.